# Bilurin í smæsta smildri

*Tað var eitt Guds undur, at bilførarin ikki lá eftir á, tá hann knústi sær bilin á Saltnesi sunnunáttina, sigur løgreglan í Runavík*



*So ótrúligt tað enn ljóðar, so slapp bilførarin við lívinum, tá hesin bilurin varð smildraður sundur á Saltnesi um fýratíðina sunnunáttina. Bilførarin, var einsamallur í bilinum, var helst slongdur úr bilinum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sveinur Tróndarson

Fólk á Saltnesi vaknaðu við kaldan dreym um fýratíðina sunnumorgunin. Uttanfyri hoyrdist gresj av mettali, sum fór singlandi eftir vegnum, eftir at hava tikið knappar fjøruti metrar av stakitti við sær á vegnum.

Talan er um ein bil, sum var á veg úteftir. Stutt eftir svingið úr Runavík hevur bilførarin, sum var einsamallur í bilinum, eftir øllum at døma mist tamarhaldi á bilinum. Eftir bremsisporunum á vegnum at døma, hevur hann roynt at bremsa, men tað hevur einki hjálpt.

Bilurin er síðani farin inn í ein garð, sum hann hevur jarðlagt, so gott sum allan.

- Hann hevur kvett einar 19 pelar av og skrætt alt stakitti niður, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík.

Sum skilst á løgregluni, so er tað eitt harrans undur, at maðurin, sum var einsamallur í bilinum er á lívi. Bilurin er so illa farin, at løgreglumenninir, ikki sóðu, hvat slag av bili talan var um.

- Nei, hann var ótrúliga ljótur at síggja til. Og tað er ófatuligt, at førarin, sum er ein 30 ára gamal maður, er komin frá óhappinum við lívinum, sigur vakthavndi.

- Bilurin var snøgt sagt í smasta smildi, leggur hann afturat.

Sum skilst, so er førarin helst slongdur úr bilinum, sum er rullaður runt fleiri ferðir áðrenn hann er steðgaður. Tá fólk kom á staðið, lá maðurin frammanfyri bilin, og hann var illa at holdum komin.

Boð vórðu send eftir sjúkrabili alt fyri eitt, og tí kom maðurin skjótt undir læknahond.

Ov nógv ferð og rúsdrekka hava eftir øllum at døma verið orsøkin til ferðsluóhappi. Vakthavandi á støðini í Runavík sigur, at sporini í vegnum — og garðurin, sum hann sá út aftaná — geva ábendingar um, at bilurin hevur koyrt heilt óvanliga skjótt.

- Vit hava eisini mistanka um, at bilførarin hevur verið ávirkaður av rúsdrekka. Tí er blóðroynd tikin av honum, sigur vakthavandi í Runavík, sum eins og eigararnir av húsunum, bilurin fór skreiðandi framvið, var skelkaður av hendingini.

Tað er nú ikki so løgið heldur, tí umframt at hava skrætt stakitti niður, er ein partur av tí slongdur inn gjøgnum gongsvindeyga. So tað er ikki so løgið, um tey hava fingið sær ein skelk.

# Enn ein tunnil í Fuglafirði

*Goymslurúmið í berginum við havnarlagið í Fuglafirði økist, samstundis sum fylt verður út í sjálvari havnini. Tá tunnil verður sprongdur inni í berginum, verður grótið nýtt til undirlag á sjónum*



*Grótið úr tunnlinum verður brúkt til undirlag undir útbyggingini hjá Havsbrún*

*Mynd: Edvard Joensen*

Edvard Joensen

**Fuglafirði:** Enn ein tunnil er liðugur inni í berginum við havnarlagið í Fuglafirði. Høllin, sum nú er sprongd, er tann fjórða og kostar umleið hálvasættu millión krónur.

Grótið, sum komið er úr tunnlinum, er brúkt til víðkan av havnarlagnum í Fuglafirði. Havsbrún hevur júst bygt nýggjar fóðursiloir og goymsluhøll, og er hetta sett á økið, sum er planerað við tunnilsgróti.

Ætlanir eru um ein tunnil aftrat, sigur Pætur Joensen, býarverkfrøðingur í Fuglafirði. Og tað grótið skal so aftur nýtast til ífyllu undir nýggjari útbygging hjá Havsbrún.

Fuglafjarðar Kommuna manglar bæði goymslurúm og havnarøki, sigur Pætur Joensen. Tá grótið verður brúkt til útfylling í havnini, fæst umleið sama økið, sum fæst av gólvvídd inni í fjallinum. Nýggja høllin inni í berginum er umleið 2.300 fermetrar, og tað fæst sama vídd av havnarøki, tá fylt verður út. Soleiðis fær kommunan dupult burtur úr at spreingja hol inn í bergið. Tað fáast umleið 26.000 kubikmetrar av gróti burtur úr einum slíkum tunnli.

Fuglafjarðar Kommuna ger arbeiðið, sigur býarverkfrøðingurin í Fuglafirði. Kommunan leigar amboð og fólk frá landsverkfrøðinginum. Hetta er fólk, sum hevur arbeitt við tunnilspreinging og tí kennir til arbeiðið.

Fuglafjarðar Kommuna eigur goymsluhølini inni í berginum, men leigar tey út til felagið Bergfrost, sum umsitir økið. Hetta felagið leigar so aftur til onnur, sum hava brúk fyri eitt nú frystirúmum ella vanligum goymslurúmum, sum eisini eru inni í berginum. Eitt nú alifóður verður goymt har inni, sigur Pætur Joensen.

Umhvørvisliga hevur tað eingi árin, at sprongt verður inn undir bygdina, sigur Pætur Joensen. Frástøðan millum hallirnar er so stór, at tað er als eingin vandi fyri, at tað sjunkar ella í ringasta falli søkkur saman. Fólk eru ógvuliga tolin og hava vant seg við, at tað ristir eitt sindur, tá sprongt verður. Eisini verða tey ávarað hvørja ferð, sigur hann.

Av øðrum arbeiðum, Fuglafjarðar Kommuna er í ferð við, nevnir býarverkfrøðingurin, at vegur verður gjørdur Vesturi í Bø. Har eru nøkur hús, sum ongan veg hava, og samstundis verður nýggj útstykking gjørd við umleið átta grundstykkjum. Kostnaðurin fyri ta verkætlanina liggur um einar fýra-fimm milliónir.

Pætur Joensen sigur, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum í Fuglafirði er stórur. Talan er í stóran mun um burturfluttar fuglfirðingar, sum koma aftur, sigur hann. Fólk, sum arbeiðir í Fuglafirði og helst vil búgva á staðnum.

Vatnverkið í Fuglafirði er útbygt, men neyðugt verður at fáa eina vatngoymslu, sum helst má gerast í fjøllunum onkustaðni. Men enn er tann ætlanin ikki komin longur enn til umhugsunar, sigur býarvekfrøðigurin.

Kommunan hevur nýliga gjørt nýggja brandstøð og nýggj læknahøli eru eisini innrættað. Úti á Kambdsali er planerað og gjørt klárt til ein bygning, sum elektrikaravirki í Fuglafirði fer at byggja.



# Gongdin er hættislig

*Edmund Joensen kallar stóra vøksturin í almennu rakstrarútreiðslunum fyri ørskap, og heldur búskapargongdina verða hættisliga*



*Edmund Joensen stúrir fyri búskapargongdini í Føroyum. Hann heldur, at talan er um ørskap at lata almennur útreiðslunar vaksa nógv*

Eyðun Klakstein

– Tær almennu rakstrarútreiðslurnar vaksa við himmalrópandi ferð, og tað er full-komiliga burturvið, heldur formaðurin í Sambandsflokkinum.

– Tað er ørskapur at lata almennu rakstrarútreiðslurnar vaksa so nógv, tá privata vinnulívið og handilslívið hevur tað gott, sigur Edmund Joensen.

Hann vísir á, at vøksturin í rakstrarútreiðlunum er einar 400 milliónir í ár, og tá tað eisini verið tikið við í myndina, at landskassin er sloppin undan rentuútreiðslum í sambandi við bankamálið, er talan um ein vøkstur upp á næstan 600 milliónir.

– Hetta má verða størsti vøksturin í Føroya søgu og boðar frá eini hættisligari búskapargongd. Her eru ongar sparingar í rakstrinum, men til dømis bara ein støðug hækking av útreiðslunum til umsitingina, sigur Edmund Joensen

## Eingin uppsparing

Hóast seinastu fíggjarlógirnar hava givið fitt yvirskot, saknar Edmund Joensen at síggja nógv umtalaðu uppsparingina hjá landskassanum.

– Innistandandi í Landsbankanum er vaksið við umleið 250 milliónum síðani hetta landsstýrið tók við í 1998, og tí má eg spyrja, hvar uppsparingin, sum skuldi verið gjørd í hesum gullárunum hjá føroyska búskapinum, er.

Edmund Joensen heldur, at landsstýrið roynir at fáa fíggjarlógina at síggja betri út, enn hon í veruleikanum er.

– Avlopið verður sagt at verða 481 milliónir, men tað er áðrenn avdráttir, og tí er veruliga avlopið 347 milliónir. Tá vit so av royndum vita, at landsstýrið støðugt kemur við eykajáttanarlógum gjøgnum árið, er myndin ikki so ljósareyð, sum landsstýrið vil gera hana til, sigur Edmund Joensen.

– Tá vit so eisini hugsa um, at landsstýrið ætlar at loysa og avskaffa ríkisveitingina, ber til at staðfesta, at so er liðugt við vælferðarsamfelagunum og íløgum í tunnlar og annað. Tað prógvar hetta fíggjarlógaruppskotið.

# Fegnast um búskaparvøksturin

*Formaðurin í Javnaðarflokkinum fegnast um framhaldandi búskaparvøkstur í Føroyum, men er ivasamur mótvegis stóra avlopinum á fíggjarlógaruppskotinum*

Eyðun Klakstein

- Tað er óført, at tað ber til at koma við einum fíggjarlógaruppskoti, sum staðfestir ein framhaldandi vøkstur í føroyska búskapinum. Tað fegnast vit eisini um, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum um fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum, sum varð almannakunngjørt fríggjadagin.

– Roknað verður við umleið 5 prosentum í búskaparvøkstri komandi ár, og tað er gott. Hinvegin kunnu vit so staðfesta, at sjálvt í so góðum tíðum ber tað ikki til hjá okkum at klára okkum uttan ríkisveitingina úr Danmark, tí verður tann lítla milliardin í blokkstuðli frároknað, er talan um eitt hall upp eina hálva milliard.

Jóannes Eidesgaard heldur, at samgonguflokkarnir, sum vilja av við ríkisveitingina, hava nakað at hugsa um, tá føroyski búskapurin sjálvt í góðum tíðum hevur blokkstuðilin fyri neyðini.

## Taka nógvar pengar frá fólki

Landsstýrið roknar við einum avlopi upp á ein hálva milliard á fíggjarlógini næsta ár.

– Tað eru nøkur ting í samfelagnum, sum hava verið forsømd seinastu árini, og har neyðugt er við stórum íløgum. Eitt nú tá talan er um Landssjúkrahúsið og eldraøkið, og tí kanst tú ivast eitt sindur í stóra avlopinum, heldur formaður Javnaðarfloksins.

– Tað er púra rætt, at allar íløgurnar kunnu ikki gerast í senn, tí búskapurin skal ikki hitast enn meira, men tað eru nakrar av íløgunum, sum verða gjørdar uttanlands, og tí ikki seta meira ferð á føroyska búskapin.

– Harafturat er tað eisini eitt sindur ivasamt, um tað er rætt at taka so nógvar pengar frá fólki í skatti og avgjøldum, tá avlopið framhaldandi er so stórt, sigur Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard ivast í, um tað er rætt at taka so nógvar pengar frá fólki í skatti og avgjøldum, tá avlopið á fíggjarlógini framhaldandi er so stórt*

